
H-Bygningurin og aðrar byggiverkætlanir á Landssjúkrahúsinum

Fíggjarnevndarfundur 17 og 19. oktobur 2023

Tíðarlinja – frá byggiskrá til prosjektering og bygging av H-bygninginum (Ll. Nr 129 frá 22. desembur 2008*), umframt upplýsing um játtan til binding av H- og B-bygninginum (Ll. 64 frá 5. mai 2021) og játtan til Víðkaða partin av kjallaranum (Ll. 82 frá 16. mai 2022)



Fermeturyvirlit

Bygningurin er **15.047 m²** uttan viðgerðarúmið, ið verður kallað garðurin hjá psykiatriska deplinum. Sí viðlagda fermeturyvirlit.

Við garðinum hjá psykiatriska deplinum er bygningurin **15.483 m²**

Fermeturkostnaður

Fermeturkostnaðurin fyri allan H-bygningin íroknað játtanina til kjallarin (víðkaði parturin av kjallaranum) er í dag kr. 726.000.000, -

Hetta gevur ein fermeturkostnað á **46.890 kr./m²**

Verður umbidna játtanin á 43,7 mió. kr. latin, verður fermeturkostnaðurin **49.713 kr./m²**

Fermetrar tiknir í nýtslu:	**m²**	**Tikið í brúk/ í LS-rakstur**
Upprunaligi kjallarin	1.368 m²	14/7-2021
Neyðstreymsøkið og Tangagarður	117 m²	10/9-2023
Stórkøkurin	1.583 m²	1/9-2023
Rehabilitering/Endurvenjing	1.180 m²	15/9-2023
Tøkni-hæddin H3	696 m²	14/7-2022
	Í alt **4.944 m²**	
Hetta svarar til áleið 1/3 av samlaða bygninginum		
Seingjarlyftan (Seingjargoymslu- og flutningstorn)		01/10-2023

Byggiplássrakstur

Tá orðið rakstur verður umrøtt í umbønini um eykajátta, so er talan um rakstur av byggiplássi, starvsfólkakostnaðir hjá Landsverk og kostnaðir tengdir at uppfylging og fakeftirliti hjá ráðgevunum. Longri tíð gongur, tess hægri verður kostnaðurin tí byggiplássrakstur er altíð tengdur at byggitíðini. Undir byggiplássrakstri liggur millum annað el-rokning fyri byggiplássstreym, tryggingar, reingerð, vaktarhald um kvøldið og náttina, umframt handverkarakostnaðir fyri at halda sjálvt byggiplássið koyrandi.

Bygningsarbeiðir

Av teimum 14,2 mió. kr. til bygningsarbeiðir eru 10 mió. Kr. til isolatiónsstovurnar. Síðani útgreininga av bygningsarbeiðum í apríl 2023 eru mett at neyðugt verður við 6 mió. Kr. Til isolatiónsstovurnar, ið LS metir at tørvur er á. Í alt 16 mió.kr. til isolatiónsstovur.

Hinar 4,2 mió. kr. skulu brúkast til dagføringar og broytingar, ið standast av menningini, bæði á Landssjúkrahúsinum og verkætlanini í síni heild. Størsti parturin av hesum skal brúkast til at økja um kt- og el-innleggingar, so fleiri starvsfólk kunnu rúmast í H-bygninginum. Á summum økjum er talan um eina tvífaldan av starvsfólkum í mun til hvat bygningurin er prosjekteraður til. At fleiri starvsfólk koma oman í H-bygnignin tænir tænstustøðinum og rakstrinum á Landssjúkrahúsinum.